almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

**Í seinasta lagi**
22. juni 2007, kl. 12.00.
Vinarliga merkið brævbjálvan: “arbeiðsmarknaðardeildin”

Arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni søkir

# ARBEIÐSMARKNAÐARKONSULENTAR OG SOSIALRÁÐGEVA

Talan er um 3 fulltíðar størv, tveir arbeiðsmarknaðarkonsulentar, og ein sosialráðgeva. Møguleiki er fyri niðursettari tíð.

**Uppgávur hjá arbeiðsmarknðararkonsulentunum**
Uppgávurnar hjá arbeiðsmarknaðarkonsulentunum verða fyrst og fremst at menna uppsøkjandi arbeiði á arbeiðsmarknaðinum, fáa avtalur í lag, gera sáttmálar í ítøkiligum málum og uppbyggja ein “grunn” av ítøkiligum arbeiðsmøguleikum, umframt menna ráðgevingina til fólk, ið fáa fyritíðarpensjón. Arbeiðsmarknaðarkonsulentarnir koma eisini at luttaka í arbeiðinum annars á deildini.

**Uppgávur hjá sosialráðgevanum**
Arbeiðið fevnir um sosiala ráðgeving og vegleiðing, vegleiðing um verkligar og útbúgvingarligar spurningar, tilrættalegging fyri umsøkjarar av tiltøkum á arbeiðsmarknaðinum og í sambandi við útbúgving, uppfylging av fyriskipanum, viðgerð og støðutakan til mál um fíggjarligar veitingar, lýsing og tilráðing í málum um fyritíðarpensjón, umframt aðrar uppgávur á deildini.

**Førleikakrøv**
- Hóskandi ástøðiliga útbúgving frá hægri lærustovni, sosialráðgevi ella líknandi
- Góð samstarvsevni
- Evni at hugsa nýskapandi og ganga nýggjar leiðir
- Góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- Evni at hugsa og arbeiða tvørfakligt og við heildarloysnum
- EDV á brúkarastøði
- Royndir í líknandi arbeiði kunnu verða ein fyrimunur

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 353510.

Arbeiðsmarknaðardeildin (AMD) á Almannastovuni fer at víðka sítt virksemi við fyriskipanum, sum miða eftir at menna rúmliga arbeiðsmarknaðin. Politiska ynskið er, at leggja størri dent á arbeiðið at útvega fólki við skerdum førleika pláss á arbeiðsmarknaðinum. Tí hevur deildin í 2007 fingið játtan á fíggjarlógini svarandi til 2 fulltíðarstørv aftrat.

Hetta, og tað at AMD í sínum núverandi skapi hevur 6 ár á baki, hevur givið høvi til at skipa eina verkætlan, har virksemið á deildini sum heild verður endurskoðað, herundir arbeiði, arbeiðsskipan, raðfestingar, mál og deilmál.

Arbeiðsmarknaðardeildin hevur sambært heimildum í forsorgarlógini og almannapensjónslógini til uppgávu at tæna borgarum, sum av sosialum ella heilsuligum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika og tí mugu hava serligan stuðul fyri at blíva arbeiðsliga og fíggjarliga sjálvbjargin.

Uppgávurnar hjá deildini eru:
- at ráðgeva og vegleiða einstaklingum um sosialar, útbúgvingarligar og verkligar spurningar
- at málsviðgera og taka støðu í einstaklingamálum um fyriskipanir á arbeiðsmarknaðinum
- at hava samband og gera avtalur við privat og almenn arbeiðspláss o.o. fyri at uppbyggja ein ”grunn” av ymiskum arbeiðum. Hetta sum liður í royndunum lættari at útvega arbeiðspláss, ið hóska til fólk við ymiskum arbeiðsligum fortreytum og forðingum, soleiðis at tey eru tøk, tá arbeiðsroynd, upplæringar- og umskúlingarfyriskipanir ella vard størv skulu setast í verk.
- at málsviðgera og taka støðu í einstaklingamálum um útbúgvingarfyriskipanir
- at taka støðu til peningaveitingar í sambandi við endurbúgvingarfyriskipanir
- at ráðgeva og vegleiða umsøkjarum av fyritíðarpensjón, lýsa mál og gera tilráðing til pensjónsfundin, sum tekur avgerð um fyritíðarpensjón.

Deildin hevur tætt samstarv við tær 4 økisdeildirnar um fyriskipanir, sum verða settar í verk í teirra øki og við aðrar deildir á Almannastovuni, umframt úteftir við aðrar stovnar.

Á arbeiðsmarknaðardeildini starvast í løtuni 8 fólk. Deildin er landsumfatandi.

KREA.FO - TEL 47 80 80

TEYMAR GÁVAN LEIKA

# Teymavirkið og Berglon søkja eftir fólki

## Maskinsmiður

Teymavirkið P/f í Runavík sóknast eftir maskinsmiði at byrja mánadagin 02.07.2007 ella skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi. Arbeiðið umfatar ymiskt smiðuarbeið umframt annað framleiðslu- og goymsluarbeiði. Løn sambært avtalu.

Vit vænta, at tú ert útbúgvin maskinsmiður ella hevur arbeiðsroyndir innan økið, at tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt og tekur ábyrgd. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men tó avbjóðandi. Roknast kann við yvirtíðararbeiði ávís tíðaskeið.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Berglon, Boks 210, 620 Runavík, í hendi seinasta lagi hósdagin 21.juni 2007.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Rúna Berg á beinleiðis tlf. 773 012.

## Skrivstovulærlingur

Berglon P/f í Runavík sóknast eftir skrivstovulærlingi at byrja 02.07.2007 ella skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi. Í lærutíðini kemur tú at gera alt vanligt skrivstovuarbeiði. Vit arbeiða við nútímas telduforritum og kunnu sostatt bjóða eina tíðarhóskandi skrivstovuútbúgving.

Vit vænta, at tú hevur FHS,- HH-prógv ella líknandi, at tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men tó avbjóðandi.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Berglon, Boks 210, 620 Runavík, í hendi seinasta lagi hósdagin 21.juni 2007.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Ingolf Petersen á beinleiðis tlf. 773 014.

## Handilslærlingur

Berglon P/f í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja 02.07.2007 ella skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi. Í lærutíðini kemur tú, upp á skift, at starvast í Teymum, Leiku og Gávuni. Skúlagongdin er í Danmark.

Vit vænta, at tú hevur FHS- ella HH-prógv, at tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men tó avbjóðandi.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Berglon, Boks 210, 620 Runavík, í hendi seinasta lagi hósdagin 21.juni 2007.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Maluna Nielsen á beinleiðis tlf. 773 021.

BERGLON

REPROZ